# Pena Lena løgd til viks eina løtu

**Við einum frálíkum bólki aftanfyri seg, kundi Lena sláa seg leysa eina løtu í kvøld. Hesin eitt sindur meiri peppaði og ´leysi´ leikluturin klæddi henni væl**

TÓNLEIKUR
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Seinastu ferðirnar, eg havi hoyrt Lenu framført, hevur tað verið akustiskt. Sum oftast við Niclasi og nú seinast á G! MINI við Annu á Váli Smith á cello. Hetta hevur riggað væl. Uppskriftin er í lagi; góð løg, góður sangur og gott spæl.

Men hetta kvøldið fann eg út av, at eg onkrastaðni innií saknaði at hoyra tónleikin í bólkahøpi. At hoyra meiri enn Lenu og kassagittara.

Aftrat sær hevði Lena nakrar av stóru kanónunum innan føroyskan tónleik: Jóhannes á Rógvu Joensen (bass), James Olsen (trummur), Finnur Hansen (ljómborð) og sjálvandi eisini Niclas Johannesen (gittar). At hesir duga sítt kramm hoyrdist eisini aftur. Tað svingaði, og sum lurtari hvíldi tú í, at tónleikararnir fóru at bera Lenu gjøgnum settið á ein virðiligan hátt. Sum eitt tok, ið koyrir við javnari ferð móti eini endastøð. Kringsett av dugnaligum monnum kundi Lena sláa seg leysa og lata ´fittheitina´ liggja eina løtu.

Lena hevur so nógv løg í skjáttuni, sum veruliga eru genial. Sjálvur helt eg, at løgini ´Can´t Erase It´ og ´Who Am I´ eydnaðust ómetaliga væl.

Og so tann obligatoriska viðmerkingin um ljóðviðurskiftini: Fyri viku síðani skrivaði eg um eina framførslu, ið snøgt sagt var myrd og grava niður av vánaligum ljóðið. Ræðuligt.

Men í kvøld var søgan ein heilt onnur. Langt síðani, at eg havi hoyrt so gott ljóð. Alt hoyrdist væl og við rættari styrki. Tað gav tónleikinum loyvi til at traðka ótarnaðan fram.



# Hanus og vinfólk sløktu



**Síðst á skránni fríggjanáttina var Hanus G. Johansen. Fyri fyrstu ferð í langa tíð spældi hann við bólki, og rundaðu tey frálíka tiltakið av við manér**

TÓNELIKUR
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Hvussu Hanus ger tað, veit eg ikki, men á ein ella annan hátt megnar hann at fanga fólk í øllum aldri. Meðan mánin hugdi at, og vindurin helt seg vekk, framførdu Hanus og vinfólk bæði nýtt og gamalt tilfar. Og øll sungu við. Tannáringar og pensionistar. Full og edrú.

Sum sagt, so hevði Hanus bólk aftrat sær fyri fyrstu ferð í nógv, nógv ár. Og hóast Hanus als ikki hevur trupulleikar við at fanga áhoyraran einsamallur, so dámdi mær væl broytingina. Onkur sangur fekk eitt jassut ´feel´, meðan teir flestu sangirnir komu undir fólkatónleik. Trummur, bassur, gittari og klaver løgdu grundina, meðan violin, klarinett, trombón og trompet kryddaðu løgini.

Hanus sjálvur sá út til at njóta sínar nýggju spælivinir. Eftir so nógv ár einsamallur á palli, er tað eisini skilligt. Vónandi verður tað ikki aftur talan um ár, áðrenn Hanus spælir við bólki aftur.

# Fingu fjøldina í kók

**Páll Finnur Páll megnaðu tað, eingin annar kláraði á Futt í Býin. Fjøldin kókaði, og tað var ónærisligt og fúlt fyri allar pengarnar**

TÓNLEIKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nú eru eftirhondini langtsíðani Páll Finnur Páll vóru á palli. Tískil var lagt upp til eitt stórsligið comeback, tá teir trinu inn á stóra pallin í kvøld. Undan framførsluni var longu ein stór fjøld møtt upp við stóra pallin, og James Olsen fekk veruliga lív í fjøldina, áðrenn Páll Finnur Páll tóku við.

Framførslan sjálv var framúr góð. Fjøldin kókaði undir allari konsertini, og tað er sera sjálvdan, at nakar bólkur klárar at halda eitt slíkt støði undir einari heilari konsert. Við kendum løgum so sum “Gulldaman”, “Herbergið” og “Forelskaður Sjónleikari” bergtóku teir enn einaferð áhoyrarnar við eini rúgvu av power í framførsluni.

Ljóðið til hesa konsertina var framúr gott, og tískil fingu áhoyrarnir fullan valuta fyri pengarnar. Enntá var tað so galið, at Páll Finnur Páll vóru noyddir at spæla eitt eykalag eftir at teir upprunaliga áttu at verða liðnir.

Tað stutta av tí langa er, at hetta var besta konsertin á kvøldinum.

